## Holst skal royna seg



Christian Holst er millum teir 18 leikararnar, sum skulu spæla fyrsta venjingardystin fyri Silkeborg í summar. Dysturin verður í kvøld móti Esbjerg. Holst og liðfelagarnir fluttu í farna mánaða upp í bestu donsku deildina, og nú skal føroyski landsliðsleikarin prógva fyri venjaranum, at hann eigur pláss í byrjunaruppstillingini.

## EB/Streymur vil hava Vatnhamar

Tróndur Vatnhamar verður møguliga við í hópinum hjá EB/Streymi, sum fyrireikar seg til altjóða uppgávurnar móti Apoel FC í Chmapions League. Rólant Højsted, formaður, váttar, at felagið hevur havt samband við B36 og málverjan. – Framvegis er einki avgjørt. René Torgarð hevur verið uttanfyri við skaða í fleiri vikur, og tí sóknast vit eftir nýggjum málverja, sigur Rólant Højsted.

# Stuttligt, spenn-andi og strævið

**Tað gjørdist eitt brak av einum dysti, tá Føroyar og Caymanoyggjar møttust í Baltichøllini í gjárkvøldið. Fimm sett máttu til, og Føroyar yvirlivdu tríggjar settbóltar til Caymanoyggjar, áðrenn sigurin var veruleiki**



Hilmar Jan Hansen

Higartil hevði føroyska spælið verið eitt sindur »annaðhvørt ella«, men í gjárkvøldið gjørdist talan um eitt brak av einum dysti, har tú ikki kundi kenna teg vísan í nøkrum sum helst, fyrr enn alt var liðugt.

Føroyar vunnu fyrsta sett tepurt, 25-22, taptu annað sett líka tepurt, 23-25, og fingu so ein avsmurning frá Caymanoyggjum í triðja setti, sum endaði 17-25. Men tá mest stóð á, megnaði liðið at reisa seg, svara aftur og vinna fjórða sett 25-20.

Nú byrjaði dramatikkurin, tí Caymanoyggjar tóktust sterkari tað mesta av fimta setti, og hevði fyrsta sett- og matsjbóltin, tá støðan var 12-14, og tann næsta, tá tað stóð 14-15. Føroyar yvirlivdu, men megnaðu ikki at gagnnýta sín fyrra sett- og matsjbólt, tá støðan var 16-15, so framvegis var tað øgiliga spennandi.

Enn eina ferð fingu Caymanoyggjar møguleikan at vinna, tá støðan var 16-17, men føroyingarnir tóktust nú veruliga at hava funnið stevið, samstundis sum Caymanoyggjar gjørdu uppstillingsfeil og annað, ið at enda hjálpti til, so Føroyar megnaðu at vinna 19-17 eftir annan sett- og matsjbóltin.

Líka so syndarligt og strævið tað var at síggja trý tey fyrstu settini – serliga annað og triðja sett – líka so stuttligt var tað at síggja fjórða og fimta sett. Spurningurin er bara, um menninir ikki eru ov seinir í gongd, men tað fáa vit so at síggja…

## Spældu sum eitt lið

Bæði venjari og spælarar vóru sjálvsagt ovurfegnir eftir manssigurin á Caymanoyggjunum í gjárkvøldið, sum kom til høldar eftir okkara fyrsta fimmsettara í kappingini.

– Hetta var ein sera góður dystur, og fyri okkum var tað stuttligt at vinna ein ordiligan dyst. Nervar gjørdu, at vit spældu so illa í øðrum og triðja setti, men tey bæði síðstu setti fingu menn tveitt nervarnar av sær. Tað var gott, at vit fyri fyrstu ferð í kappingini veruliga spældu sum eitt lið, segði Fridolin Bic, venjari.

– Hetta var heilt ótrúliga strævið, men stuttligt til endans. Og hetta var ein góður dystur, sum var stuttligur at spæla. Tíverri hava vit øgiliga lágt botnstig, men tá tað riggar, sær einki út til at vera ófort. Kanska eru vit allíkavæl ikki betri enn tað sama, og her hevur eisini verið stór útskifting á liðnum hjá okkum, staðfesti liðformaðurin, Ragnar í Haraldsstovu Petersen.

Tann spælarin, ið kanska skaraði mest burturúr, var samstundis elsti spælarin, Brian Poulsen, ið beint eftir dystin mátti fáa ísposar á lendarnar og eina snarviðgerð frá fysioterapeutinum, Guðrið Mortensen, sum vit kenna frá millum annað hondbóltslandsliðnum.

– Tað var ótrúliga deiligt, at vit kundu spæla ein slíkan dyst, eftir at vit taptu í gjár. Hesa ferð vóru vit aftanfyri í fimta setti, men fingu hálað okkum uppaftur, og tað ger sigurin uppaftur stuttligari, segði Brian Poulsen.

*hil*

# So riggaði alt

**Eftir ein skinklandi innsats ímóti Grønlandi, fingu føroysku kvinnurnar víst í dystinum ímóti Gotlandi, at knotur eru í teimum og at grønlandsdysturin var ein einsamallur »kiksari«**



Hilmar Jan Hansen

Føroyska kvinnuliðið var ikki til at kenna aftur, tá tað í gjár fór á vøllin ímóti Gotlandi. Her vóru ongar av ónollunum frá dystinum ímóti Grønlandi at síggja, og talan var bara um hendinga feilir allan dystin.

Eftir eitt fyrsta sett, sum Føroyar vunnu 25-9, kom av álvara í øðrum setti til sjóndar, hvussu væl tað kann liggja fyri, tá allar gera sær ómak. Helst er hetta eisini størsti settsigur hjá Føroyum nakrantíð í oyggjaleikaflogbólti, tí eftir at hava verið á odda 18-0, vunnu kvinnurnar settið 25-2!

Og hóast Gotland royndi at muta eitt sindur ímóti í triðja setti, var heldur einki at gera har. Hóast onkrar útskiftingar á føroyska liðnum, var eisini hetta settið koyrt trygt í posan við úrslitinum 25-11.

Yvirhøvur var talan um ein sera sannførandi 3-0 sigur, ið var grundaður á álopsspælið, ið koyrdi framúr væl allan dystin. Skinklandi innsatsurin ímóti Grønlandi var lagdur aftur um bak, og nú sást, at knotur vóru í føroysku kvinnunum, ið kunnu vera øgiligar, tá tær fáa alt at ganga eftir vild.



Føroysku flogbóltskvinnurnar lurta eftir góðum ráðum frá venjarunum báðum

Mynd: Álvur Haraldsen

## FAKTA

**Kvinnur:** Føroyar-Gotland 3-0 (25-9, 25-2, 25-11)
**Menn:** Føroyar-Caymanoyggjar 3-2 (25-22, 23-25, 17-25, 25-20, 19-17)

## Færri feilir

Venjarin hjá flogbóltskvinnunum, Kristian Mikkelsen, var í munandi betri hýri eftir dystin ímóti Gotlandi í gjár, enn hann var eftir dystin ímóti Grønlandi í fyrradagin.

– Vit førdu hagtøl yvir dystin ímóti Grønlandi, og har vísti tað seg, at vit góvu teimum heili 39 stig. Men í dag var talan um heilt annað spæl frá okkara síðu, og serliga frøddust vit um, at vit gjørdu nógv færri feilir, sigur Kristian.

– Dysturin vísti, at vit kunnu rættiliga nógv, tá vit spæla væl. Eg hevði væntað, at vit vunnu 3-0 á Gotlandi, men eg má viðganga, at eg ikki hevði væntað ein so sannførandi sigur, sum fyrst og fremst komst av okkara góða spæli, heldur enn at gotlendsku kvinnurnar ikki nyttaðu nakað.

*hil*